# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG

03
12




## Nýggir dagstovnar





## Annika skrivar frá Landsleiðaradegnum 2012

# Úr innihaldinum


Oddagrein 2

Tíðindi frá felagnum 4

Síggja, rúma og hoyra børnini 6

Eintýðugt ynski frá foreldrum: Stovnspláss heldur enn dagrøkt 8

Frits hevur listprýtt STROPAN 9

Námsfrøðiligt margfeldi 11

Pedagogfelagið við á Fólkafundi 2012: Stórur áhugi fyri básinum 13

Dagstovnaleiðarar í Havn gjørt uppskot um fyrireikingartíð 14

Góð fyrireiking gagnar øllum 15

Burðardygg leiðsla – leiðsla við hjartanum 16

Pedagogfelagið fyrireikar sín egna FØROYSKA sosialpedagogiska profil 19

ØLL hava fráboðanarskyldu 21

Altjóða sosialpedagogiskur dagur 23


# KOLOFON


**ÚTGEVARI:**
Føroya Pedagogfelag
Tlf. 35 75 76 – Fax 35 75 73
pedagog@pedagogfelag.fo – www. pedagogfelag.fo
**LAGT TIL RÆTTIS:** Sp/f Rit & Ráð
Tel. 22 92 42 – www. ritrad.fo
**UMBRÓTINGING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ:**
Føroyaprent – www.foroyaprent.fo
**ÁBYRGDARBLAÐSTJÓRI:** Maud Wang Hansen
maud@pedagogfelag.fo
**BLAÐIÐ VERÐUR PRENTAÐ** í 2500 eintøkum, kemur út fýra ferðir um ári, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis
**ONNUR ÁHUGAÐI** kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, við at seta seg í samband við felagið.
**LOYVT ER** at endurgeva tilfar úr blaðnum (myndir undantiknar) treytað av at keldan verður upplýst.
**FORSÍÐUMYNDIR:**

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705


# ODDAGREIN


Maud Wang Hansen

## Góðu limir í Pedagogfelagnum

Almannastovan og Nærverkið eru løgd saman og eita nú Almannaverkið, hetta fyri at seta borgaran í miðdepilin. Í juli mánaði sendi Pedagogfelagið nakrar ítøkiligar spurningar til leiðsluna fyri Almannaverkið og bað um svar upp á tey viðurskifti, sum beinleiðis raka limirnar í Pedagogfelagnum. Mánaðir seinni fekk felagið boð um, at enn er ikki komið nóg langt við arbeiðinum til at svara ítøkiliga upp á okkara spurningar. Eftirfylgjandi sendi felagið nýggjar spurningar um somu viðurskifti – her kom einki svar. Á kunningarfundum sita vit málleys og skilja ikki, hvat fer fram, og tá spurt verður um hetta ikki sær spennandi út, so má eg siga **nei!** – hetta sær ikki spennandi út – **hetta sær ræðandi út!**

Tíðindi vóru í miðlunum frá Almannaverkinum um at flyta búfólk við tvingsli úr sínum egna heimi. Hetta eru tíðindi, sum ikki eiga at koma fyri í 2012, har ST-dómstólurin greitt ásetur, hvørji rættindi borgari við breki hevur í sambandi við bústað og ávirkan á egið lív. Lat ongan iva vera um, at fólk við menningartarni hava júst somu rættindi sum allir aðrir borgarar í landinum. Munurin er bara tann, at fólki við menningartarni tørvar hjálp til at gera vart við síni viðurskifti, og er tað tí uppgávan hjá starvsfólkunum og hjá teim avvarðandi. Lukkutíð sluppu hesi fólkini at flyta inn aftur í sítt egna heim.

Nýggja barnaverndarlógin er á breddanum í hesum døgum. Tað er nú greitt, at ein og hvør hevur skyldu at boða frá einum illgruna um, at eitt barn, ein ungur ella einhvør borgari er fyri ágangi ella sosialum mistrivnaði. Tá hava starvsfólk víðkaða skyldu til at boða frá. Tað er umráðandi at minnast til, at víðkaða fráboðanarskyldan kemur fram um tagnarskylduna. Er talan um børn, ung ella vaksin, sum ikki sjálv duga at verja seg og ikki kenna síni rættindi, so hevur samfelagið og harundir starvsfólk skyldu at hjálpa og at vísa á, hvørji rættindi borgarin hevur.

Fleiri mál hjá limum í Pedagogfelagnum eru ikki viðgjørd í Mentamálaráðnum, tí kommunurnar siga tað ikki vera kærumyndugleika. Tvey av hesum málum eru nú farin til Løgtingsins umboðsmann, og Pedagogfelagið hevur stevnt Vágs kommunu fyri brot á dagstovnalógina og fyri ólógliga at siga limir okkara úr starvi. Í hesi vikuni fekk Tórshavnar kommuna eina álvarsliga átalu frá Løgtingsins umboðsmanni fyri handfaringina av einum máli hjá einum limi í Pedagogfelagnum. Feilir, sum fyrisitingarliga kundu verið rættaðir eftir stuttari tíð, tóku alt ov langa tíð at fáa í rætt lag, og ringast gekk alt hetta út yvir lim okkara, sum bert kravdi síni rættindi.

Nú bygda- og býráðsval eru fyri framman, vil eg minna á, at sáttmálapartarnir eru samdir um, **at tíð skal latast til at fyrireika og eftirmeta pedagogiska arbeiði.** Tað hevur verið eitt neyðugt stig at taka, til tess at tryggja limum okkara góð og greið arbeiðsviðurskifti. Ymiskt er, hvussu kommunurnar hava viðgjørt henda spurning, og sum skilst hava summar kommunur sitið og bíðað eftir einum arbeiðsbólki í Tórshavnar kommunu. Formaðurin í KAF hevur gjørt Pedagogfelagnum greitt, at tað var eingin avtala gjørd um, at kommunurnar kring landið skuldu bíða eftir hesum arbeiðsbólki. Tær kommunur, sum ikki lata fyrireikingartíð, tær bróta sáttmálan – so einfalt er tað. At kommunurnar siga seg ikki hava ráð at lata fleiri tímar, tað er ein spurningur um raðfesting. Vit síggja, nú val verður, at tað er ikki hissini, hvat pengar kunnu finnast til. Tær kommunur, sum ikki hava lagt seinastu lønarhækkingar aftrat játtanum hjá stovnunum, hava bara gjørt tað enn verri fyri borgaran. Hóast tað ikki snýr seg um nógvar pengar, so ger tað stóran mun, tá leiðslurnar hava skyldu til at gjalda meira í løn umframt at finna rúm til eyka fyrireikingartíð, uttan samsvarandi at fáa hægri játtan, ja so gongur tað snøgt sagt ikki upp. Hesa tvístøðu eiga kommunurnar at syrgja fyri at loysa. Tað eru ikki kommunurnar, sum gjalda fyri dagstovnaøkið, tað er skattgjaldarin og tey, sum brúka skipanina. Skattgjaldarin velur politikarnar til at umsita hesar skattakrónur og at raðfesta, hvussu skattakrónurnar verða brúktar. Leiðarin á einstaka stovninum hevur ikki heimild at áseta játtanina, men skal ráðgeva kommununi um, hvat tað kostar at geva eina ávísa tænastu, harundir at starvsfólk eru væl fyrireikað og kunnu eftirmeta tað pedagogiska arbeiðið. So stendur tað til fólkavaldu politikarnar at fylgja tí, sum námsfrøðiliga serfrøðin vísir á.

Gott val!



BANK**NORDIK**

# Persónlig røkt av tínari pensjón

Nýtt í Føroyum
- og bert hjá
BankNordik

## Nú bjóðar BankNordik Persónliga PensjónsRøkt

Persónlig PensjónsRøkt frá BankNordik er til tín, ið vil økja møguleikan fyri størri avkasti av tínari pensjónsuppsparing.

Okkara serfrøðingar seta tín pening í virðisbrøv og hava støðugt eftirlit við og røkta tínar íløgur. Íløgurnar verða lagaðar eftir tínum persónliga íløguprofili, og við Netbankanum hevur tú altíð yvirlit yvir tína pensjónsuppsparing.

Øll kunnu vera við. Lægsta upphædd fyri at stovna Persónliga PensjónsRøkt er 40.000 krónur.

Tosa við tín ráðgeva í dag um Persónliga PensjónsRøkt.

### 4 fyrimunir við Persónligari PensjónsRøkt

- ☑ Økir møguleikan fyri størri avkasti av tínari pensjónsuppsparing
- ☑ Verður lagað eftir tær og tínum íløguprofili
- ☑ Okkara serfrøðingar hava støðugt eftirlit við og røkta tínar íløgur
- ☑ Tú hevur altíð yvirlit

**www.banknordik.fo**

SENDISTOVAN

# NEVND



**Maud Wang Hansen**
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Jógvan Philbrow**
Næstformaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Elin N. W. Tausen**
Nevndarlimur
elin@pedagogfelag.fo



**Jannie Jacobsen**
Nevndarlimur
jannie@pedagogfelag.fo



**Guðrun Eysturlíð**
Skrivari
gudrun@pedagogfelag.fo

# UMSITING



**Maud Wang Hansen**
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Katrin Poulsen**
Umsitingarleiðari
katrinp@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo



**Anna Dalsgarð**
Bókhaldari
anna@pedagogfelag.fo

TÍÐINDI FRÁ FELAGNUM

# Leiðararáðið

### Endamálið er:

- At lýsa støðuna og møguliga tørvin hjá stovnum og leiðarum yvirfyri nevndini.
- At koma við uppskotum um, hvussu nevndin og leiðarar í felag kunnu lyfta økið, bæði fakliga og fyrisitingarliga.

### Arbeiðsuppgávurnar eru:

- At bjóða ráðgeving til leiðarar.
- At savna og samskipa uppskot til nevndina, til dømis til sáttmálasamráðingar, leiðaraprofil og annað.
- At bjóða hjásitara.
- At skipa fyri árliga Landsleiðaradegnum.
- Fyri at vita, hvat rørir seg millum leiðarar, er tað av týdningi, at vit hoyra frá tykkum.

Tel. nr. 287574

Telefonin er opin frá kl. 9.00-16.00 gerandisdagar. Um vit ikki svara, vinaliga send eini sms boð og vit venda aftur til tín.
leidarin@pedagogfelag.fo

Í leiðararáðnum eru:
Joan Midjord, Poula Ejdesgaard, Nancy Poulsen Mirjam Johannesen og Hildur Hermansen



# ½ eyka frídag

Teir limir sum starvast mánadag til fríggjadag, eiga ½ frídag fyri Ólavsøkuaftan, sum í ár fall á ein leygardag.

# Nýggj lønartalva

Tann nýggja lønartalvan, ið er galdandi frá 1. oktober 2012, sæst á heimasíðu felagsins
www.pedagogfelag.fo/lønartalvur.

# 30 ára fagnaður

## Pedagogfelagið skipar fyri stórum námsfrøðiligum tiltaki í november

Á heimasíðu felagsins ber til at tekna luttøku til 30 ára fakfagnaðin fyri at hátíðarhalda fakið og fakfelagið.

– Ætlanin er at hava tveir dagar saman, har vit síggja og hoyra um nakað av øllum tí fantastiska námsfrøðiliga virkseminum, sum fer fram hvønn dag um alt landið.

Tankin er at lýsa bitar av øllum hesum í smáum verkstovum, sum tilsamans skapa eitt stórt, fjølbroytt og litríkt klútateppi av námsfrøði.

Ein rúgva av námsfrøðingum, sum hvør í sínum lagi brenna fyri fakinum hjá sær, koma at fortelja út frá ymiskum heraðshornum í námsfrøðini um teirra lítla part av klútateppinum, sigur Pedagogfelagið.

Tiltakið verður á Hotel Føroyum í døgunum 9. og 10. november og byrjar við, at Jóhannes Miðskarð, sum er annar av gestarøðarunum, hugleiðir um avbjóðingar á námsfrøðiliga økinum. Annar stevnudagurin byrjar við at hin gestarøðarin, Rógvi Thomsen, hevur ein fyrilestur, hann kallar „Tú upphavsins lív – børn og ung sum javnbjóðis medspælarar í pedagogiskum og sosialum arbeiði". Tann 10. november Kl.19.00 verður gallaveitsla við borðhaldi og góðum undirhaldi. Veitslustjóri er Jensina Olsen. Eftir borðhaldið spæla Vælumtóktu „Hitmen".

**Tilmeldingarfreist er 5. november.**




# Fá upp til
# 32% í avsláttri

**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- ↘ Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- ↘ Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- ↘ Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**






**Hevur tú spurningar, ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón

# Síggja, rúma og hoyra børnini

*Hesi eru høvuðsmiðini í námsfrøði okkara, sigur Jógvan Philbrow, leiðari í nýggja dagstovninum Stropa á Kambsdali*

Orð og myndir: Tórfinn Smith

Ikki kann sigast annað enn, at mentanarvikan í Fuglafirði endaði 21. september við manér, tá skipað varð fyri hátíðarhaldi í sambandi við, at landsins nýggjasti dagstovnur, Stropin á Kambsdali, alment varð tikin í nýtslu.

Leiðarin á nýggja dagstovninum, Jógvan Philbrow, kundi av røttum fegnast um teir snotiligu karmarnar, tey nú fingu høvi til at fylla út við einum gevandi og spennandi gerandisdegi, har børnini kunnu kenna seg trygg, soleiðis at tey lættari kunnu granska lívið, sum Jógvan tók til í røðu síni. Hann segði, at eins væl og stovnurin við sínum vakra sniði og framúr góðu umstøðum tekur seg út, so skal námsfrøðin eisini vera eins góð og gevandi sum alt annað.

– Høvuðsmiðini eru, at vit sum vaksin síggja, hoyra og rúma tey ymisku børnini og harvið geva teimum møguleika at merkja, at tey megna lívið, eru sjálvbjargin, eru gávumild og hoyra til. Treytirnar fyri at kunna gerast virknir samfelagsborgarar, sum megna at luttaka og virka í dagsins samfelag, skulu stuðlast her á staðnum, segði dagstovnaleiðarin, sum hevði sett sær stór mál,- at vera fremst, ikki bert tá tað ræður um góðar fysiskar karmar, men eisini viðvíkjandi innihaldi.

## Víðan sjónarring

Jógvan letur væl at samansetingini av starvsfólkahópinum, sum røkkur víða. Av teimum sjey starvsfólkunum, sum higartil





*Jógvan Philbrow, leiðari á nýggja dagstovninum og Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði*

hava fingið starv á nýggja stovninum, er onkur eldri pedagogur við drúgvum royndum, onkur er nýútbúgvin pedagogur, og hjálparfólkini hava eisini drúgvar starvsroyndir. Millum starvsfólkini er ein serbi, sum umframt at virka sum pedagogur á Stropanum, er fótbóltsleikari og venjari. At hava ein millum okkum við aðrari bakgrund og sum ivaleyst sær uppgávuna frá heilt øðrvísi sjónarhorni, enn hini starvsfólkini eru von við, heldur Jógvan avgjørt vera eina styrki og kann bert vera við til at víðka sjónarringin hjá øllum.

Jógvan heldur tað vera sera umráðandi, at starvsfólkini við teirra ymiskleika arbeiða í einum toymi og eftir einum leisti, sum fyrst og fremst varpar ljós á, hvat børnini duga,- at síggja møguleikar heldur enn trupulleikar, og veruliga geva børnunum kensluna av, at starvsfólkini leggja til merkis, hvat børnini duga. Børnini skulu hava suksé-upplivingar, sum Jógvan tekur til.

## Pedagogar við frá byrjan

Líka síðani fleiri nýggir dagstovnar fóru at leggjast til, hevur verið stórt ynski hjá Pedagogfelagnum, at pedagogiskur fakkunnleiki er við frá byrjan, og soleiðis hevur eisini verið í flestu førum, eisini í sambandi við nýggja dagstovnin á Kambsdali. Leiðarar á dagstovninum í Fuglafirði hava verið við líka frá projekteringini, og tað heldur Jógvan sæst aftur í lidna úrslitinum. Tey hava m.a. havt í huga, hvat kundi verið gjørt betur í gamla dagstovninum, soleiðis at hesin nýggi stovnurin hevur alt tað, sum ynskiligt er.

## Náttúruøki

Dagstovnurin Stropin liggur í vøkrum og stórslignum náttúruøki skamt undir einum fjalli og við vakra á og vatn, og tí heldur Jógvan tað ikki vera annað enn sjálvsagt, at hesar náttúrugivnu umstøðurnar verða ein partur av virkseminum á stovninum. Gartnarin er farin at planta eina lítla viðarlund, sum vónandi einaferð fer at koma rættiliga fyri seg. Jú, økið er spennandi og hevur nógvar møguleikar við sær.

Á Stropanum byrja tey við 27 børnum, 12 vøggustovubørnum og 15 í barnagarði. Tá stovnurin er fullsettur, verður rúm fyri 78 børnum.

Kambur, sum er frítíðarskúli og staðið, har tey elstu barnagarðsbørnini ganga, umframt børn í yngstu skúlaflokkunum, er næsti granni og heldur fram at virka, sum hann hevur gjørt seinastu seks árini, og tað ger dagstovnurin í Fuglafirði eisini. Hinvegin verður dagrøktin nú niðurløgd.



*Sum vera man fegnaðist borgarstjórin um hetta nýggja frambrotið á barnaansingarøkinum í kommununi*

## Eintýðugt ynski frá foreldrum

# Stovnspláss heldur enn dagrøkt

Orð og mynd: Tórfinn Smith

Samstundis, sum vit síðani 1998 hava havt eina vælvirkandi dagrøkt, so hevur ynski verið frammi frá foreldrum um at fáa møguleika fyri dagstovnaplássi. Við hesum nýggja barnagarðinum er hesin tørvur gingin á møti, segði Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði, tá nýggi dagstovnurin á Kambsdali alment varð tikin í nýtslu. Borgarstjórin greiddi frá, at á heysti 2006 tók býráðið avgerð um at byggja nýggjan dagstovn á Kambsdali, og árið eftir vóru fyrstu krónurnar settar av til endamálið. Síðani tá eru 25 milliónir játtaðar, og tað roknaði hann við fór at halda, nú bygningurin stendur liðugur.

Síðani barnaansingarøkið varð lagt út til kommunurnar burturav at umsita, hevur kommunan miðvíst arbeitt fram ímóti at nøkta tørvin á barnaansing. Saman við barnagarðinum í Fuglafirði, sum varð tikin í nýtslu í 1991, eini sera væl virkandi dagrøkt frá 1998 og frítíðarskúla, sum byrjaði í 2002, helt borgarstjórin seg kunna siga, at barnaansingin í kommununi hevur virkað væl. Men, legði hann afturat, tað hevur tó verið eitt eintýðugt ynski frá foreldrum, at teirra dagrøktarbørn høvdu møguleikan til eitt dagstovnapláss. Hesin tørvur er nú nøktaður og dagrøktin niðurløgd.

Sum vera man fegnaðist borgarstjórin um hetta nýggja frambrotið á barnaansingarøkinum í kommununi og nýtti høvi til at siga frá endamálinum við námsfrøðiliga arbeiðinum á dagstovninum, sum sambært grein 2 í dagstovnalógini er:

„Við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan hátt og í samvinnu við foreldrini at geva børnunum eina kristna og siðalagsliga uppaling.

At menna barnanna andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

At búgva børnini til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldu í einum fólkaræðisligum samfelag.

At menna tey skapandi evnini hjá børnunum við atliti til at styrkja teirra samleika, sjálvsvirði, sjálvskenslu og evni til at taka sær av egnum viðurskiftum á ein friðarligan og samstarvandi hátt.

At tryggja børnunum eitt heilsugott og rørsluliga stimbrandi umhvørvi innadura og við uttanumøki, sum hóskar til barnsins aldur og førleika.

Í samstarvi við heimini at styrkja um barnsins fjølbroyttu menning í tøttum samspæli við náttúruna.

Landsstýrismaðurin veitir kommununum ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum.“

# Frits hevur listprýtt STROPAN





Orð og myndir: Tórfinn Smith

Sjálvandi skal ein og hvør dagstovnur hava eitt navn, og til tess beyð Fuglafjarðar kommuna til eina kapping. Eitt av innkomnu uppskotunum kom frá fuglfirðinginum og listamanninum Frits Johannesen, sum vann kappingina við navninum „STROPIN", sum nýggi dagstovnurin á Kambsdali nú eitur.

Uttanum sum innan hevur Frits Johannesen listprýtt nýggja dagstovnin, og týðiligt samband er millum navnið og hvussu listamaðurin valdi at listprýða stovnin.

Uttan um stovnin eru smáar og litfagrar standmyndir settar á bøllugrót, so nógvar í tali sum samsvarar við talið á barnagarðsbørnum á stovninum, soleiðis at hvørt barnið eigur sína standmynd. Kemur tú inn í gongina, hevur listamaðurin skipað listprýðingina sum eggið í reiðrinum, og hann greiðir soleiðis frá:

– Eggið kemur í stropa, í eygað, so brestur fyri nev, og ungin kemur út. Tá eru vit í felagsrúminum. Sostatt verða fyrstu skapini skap av tí, sum er í stropanum. Sporini føra alla tíðina fram til felagsrúmið og minna á tað, sum fer at henda, tá ið komið verður inn um gáttina til felagsrúmið. Sporini vísa vegin.

Í felagsrúminum er stórur veggjamálningur, sum listamaðurin hevur kallað Talgild børn, sum sita við eina teldu ella ipad. Úr hesi verð flyta seg ikonir upp á veggin.

Um listaverkið sigur Frist, at øll eru vit, um vit vilja tað ella ikki, talgild frá barnsbeini av. Hetta er tí eitt myndaevni, sum børnini kenna seg aftur í, og tað er eisini meiningin við tí.

*Í felagsrúminum hevur Frits prýtt við stórum veggjamálningi*



## Komið í stropa

Ein dagin eg einki sá,
tí eg í einum eggi lá.
Tá var eg pinkulítil –
ja, bert eitt lítið strá.

Ja, eggið var vøgga mín,
og hvítin var mítt hvíta lín.
Tá var eg pinkulítil
og lá í lítlum skrín'.

Ein dagin eg rembdi mær,
brátt alt í einum stropa var.
Tá var eg pinkulítil –
og hevði ongar tær.

Eg dag um dag svam framvið
sá fleiri stropar lið um lið.
Tá var eg pinkulítil –
og fekk so góðan frið.

## Komið í eygað

Ein dagin, tá birtist ljós,
og alt í einum skifti kós.
Tá var eg pinkulítil
ja, bert eitt lítið dism.

Kring meg var ein reyðdæmd blomma
nógv størri enn eitt komma,
men nógv minni enn mín gamla omma.

Og stropin tók nøkur tøk,
og mín sann, blomman rann so møk.
Tá var eg pinkulítil
og alt í eygað kom.

Og stropin um eygað lá,
eg stóð á míni stórutá.
Tá var eg pinkulítil
og svam í hvíta runt.

## Komið í unga

Sól og summar –
grønir runnar –
úr einum eggi –
bøga og steggi.
Liggja í blommu og plia,
meðan ternur á firðinum kria.

Hvarv burt stropin
blomman opin.
Lív kom í unga –
nevið og tunga –
eygað á høvdið seg setur,
meðan tjaldrið á túgvuni letur.

Kom í unga
letur tunga.
Kom upp í skapið
stapi á bakið
kløur á beinið seg festi,
meðan starin hann syngur á neysti.

Fór at rørast
og at nørast,
vaks høvdið bjarta
lunga og hjartað,
nevið mót skalið nú dunkar,
meðan eygað í blommuni blunkar.

## Brestur fyri nev

Tað bankar og pikkar uppá –
hvíta skalið rivnar
og brotnar so hvørt.
Úr eggi kemur eitt fitt nev,
og ei var tað stórt.

Tað brestur og brakar um nev
eggjaskalið knúsast,
og út kom ein klógv
og undan kom tá eitt bein,
sum stóð upp í rógv.

Tað livir og rumsast í skál
út kom fuglaungin
og letur sítt kó,
sum ljóðar eymligt og so snjalt –
eitt kærkomið ljóð.

Ja, kanska er hetta talgilt –
stropin, eygað,ungin –
sum er í Guds ond,
sum livir stillan sítt lív
í hansara hond.

*Frits, 21. juli 2012*



# Námsfrøðiligt margfeldi

Sigga Óladóttir Joensen er leiðari í Barnahúsinum IMBA á Fossánesi

*– Barnahúsið IMBA fer ikki at leggja seg eftir ávísum námsfrøðiligum ástøði, men vit fara at leggja stóran dent á allar hugsandi ástøðiligar námsfrøðiligar hugsanir. Børnini skulu ikki lagast til ávísa námsfrøðiliga hugsan, men námsfrøðin skal lagast til barnið, sigur Sigga Óladóttir Joensen, leiðari í Barnahúsinum IMBA í Hvannasundi*

Orð og myndir: Tórfinn Smith

Fyrst í apríl mánaði í ár lat Barnahúsið IMBA sínar dyr upp fyri vøggustovu-, barnagarðs- og frítíðarskúlabørnum í Hvannasunds kommunu, samstundis sum dagrøktin í økinum varð tikin av.

Hvannasunds kommuna hevur bjartskygdar ætlanir um framtíðarvøkstur og menning, og sum ein fortreyt fyri tí er dagstovnaøkið útbygt at nøkta tørvin nakað inn í framtíðina. Í einum av nýggjastu dagstovnunum í landinum eru nú 10 vøggustovubørn, 20 í barnagarði og 13 í frítíðarskúla. Frítíðarskúliun fevnir um børn frá 1. til 3. flokk. Men pláss er fyri enn fleiri, tilsamans 60-70 børnum í kommununi, sum fevnir um bygdirnar Hvannasund, Norðdepli og Depil.

Fysisku karmarnir eru avbera góðir. Stovnurin er í fýra eindum. Tær tríggjar til vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla, og so er ein, sum enn stendur tóm.

## Margfelt ástøði

Leiðari á stovninum er námsfrøðingurin Sigga Óladóttir Joensen.

– Vit hava onga fasta námsfrøðiliga tilgongd. Vit ynskja ikki, at okkara stovnur skal vera ein Rudolf Steiner stovnur, Howard Gardner stovnur ella at byggja á annað ávíst námsfrøðiligt ástøði, men vit vilja fegin fevna um øll hugsandi námsfrøðilig ástøði, lagað eftir teimum børnum, sum vit varða av. Vit eru útbúnir námsfrøðingar, sum ynskja at menna okkum á øllum økinum og ynskja ikki at pota eitt barn í eitt ávíst ástøði, men heldur laga námsfrøðiliga ástøði eftir hvørjum barni, tí børn eru so sera ymisk. Tað gera vit við at menna okkara kunnleika til tær ymisku ástøðiligu hugsanirnar og byrja við Howard Gardner, sum hevur við innlæring av børnum at gera. Tað verður okkara fyrsta stig, og tað brúka vit nógva tíð til at práta saman um, sigur Sigga, sum






### Um navnið á Barnahúsinum IMBA verður sagt:

Imba var ein megnarkvinna. Hon búði í Múla og livdi um ár 1600. Eftir hana er Imbjamørk í Múla nevnd. Á fjalli hevði Imba ódnina Imbjarók, sum eitur eftir henni. Imbjarók gongur runt Borðoynna og er ein av ovastu rókunum.

Imba átti tveir beiggjar, Jógvan og Andras. Andras er kendur fyri at hava framúr gávur at reka seyð og gera rættir. Andras í Múla skal hava gjørt fleiri av teimum bestu rættunum í Norðuroyggjum.

saman við sínum starvsfeløgum seinni fer undir at viðgera onnur ástøði.

## Góð fyrireiking

Nógv hevur verið tosað um fyrireikingartíð hjá námsfrøðingum, og hvat hendan tíð skal brúkast til, men Sigga er ikki í iva.

– Í fyrsta lagi nýta vit fyrireikingartíðina til at práta um, hvørji námsfrøðilig ástøði vit vilja nýta í sambandi við tær avbjóðingar, sum børnini her og nú standa frammanfyri, men vit leggja eisini stóran dent á at práta um tey ymisku ástøðini. Ikki minst fyri at geva okkara dugnaligu hjálparfólkum innlit í ástøðiligar spurningar, men hetta kemur eisini útbúnu námsfrøðingunum til góðar, og tað vekir uppaftur frálæruna frá skúlanum. At tey brúka rúma tíð til at tosa um ástøðiligar spurningar heldur Sigga vera mennandi fyri fakliga áhugan millum øll starvsfólk.

## Gagnnýta náttúruna

Á Fossánesi eru vit rættiliga á bygd, har alt umhvørvið kann sigast at vera eitt stórt og natúrligt spæliplass fyri børn, og tað fáa tey á Barnahúsinum IMBA eisini gagn av. Sigga greiðir frá, at tey gera nógv við at vera úti í náttúruni. Oman í fjøruna at fanga krabbar og annað, á keiina, niðan í fjøllini, í ánna, jú hetta hevur stóran áhuga millum børnini. Einki er meira natúrligt enn tað at brúka hesar umstøðurnar, sum vit eru ein partur av, sigur Sigga.

## Gott samstarv við skúlan

Skúlin á Fossánesi er næsti granni hjá Barnahúsinum IMBA, og júst tí vilja tey eisini gera gagn av. Frágongdin frá barnagarði í skúla kann fyri mong tykjast sum eitt stórt stig, men við góðum samstarvi millum dagstovn og skúla gerst tilgongdin meira lagalig.

– Hetta liggur sjálvandi eisini frammarlaga í okkara hugsan, men enn eru vit ikki komin so langt í so máta, men kortini hava vit longu skipað eitt sera gott samband millum okkum og skúlan. Eitt nú við ítróttardegnum, sigur Sigga, sum greiðir frá síni jaligu uppliving frá ítróttardegnum á Toftum fyrr í ár, har hon var við frítíðarskúlabørnunum, og har bæði starvsfólkini á Barnahúsinum IMBA og skúlanum luttóku. Har fingu bæði børn og starvsfólk eitt sera gott samband hvørt við annað.

## Serstova fyri allar Norðoyggjar

Sigga hevur eitt hugskot um at brúka ta stovuna, sum enn stendur tóm, sum serstovu til børn, sum hava serligan tørv.

– Vit hava í løtuni eina stovu, sum enn stendur tóm, og hon hevði riggað sera væl til eina serstovu fyri allar Norðoyggjar, sum ikki hava eina veruliga serstovu til endamálið, har allur fakkunnleikin kundi verið savnaður. Her kundu børn við heilt serligum tørvi fingið eina námsfrøðiliga menning. Eg kundi hugsað mær at savna øll hesi børn her at fáa nøktandi námsfrøðilig tilboð og hjálp fyrst og fremst til frama fyri børnini, og tað hevði eisini gjørt arbeiðið hjá námafrøðingunum meira spennandi og lokkandi, samanborið við at hava ófaklærdar stuðlar, sigur Sigga sum heldur, at ein forðing hjá námsfrøðingum at taka sær av serøkinum er, at tímarnir saman við børnum við serligum tørvi eru so mikið spjaddir, at tað ger tað minni áhugavert hjá námsfrøðingum.

– Jú, eitt savnað námsfrøðiligt heildartilboð fyri allar Norðoyggjar er mítt stóra ynski til gangs fyri tey børn, sum hava tørv á tí, og sum neyvan hevði kostað kommununum meira, men hevði givið eitt munandi betri úrslit, sigur Sigga, sum vónar at hugskotið fær góða móttøku í kommununum í Norðoyggjum.

## Pedagogfelagið við á Fólkafundi 2012

# Stórur áhugi fyri básinum

Orð og myndir: Tórfinn Smith

At eitt tiltak sum Fólkafundurin, sum í ár varð fyriskipaður í Hoyvík, eigur at verða eitt afturvendandi tiltak, er forkvinnan í Pedagogfelagnum, Maud Wang Hansen, ikki í iva um. Mong nýttu høvi til at vitja básin hjá Pedagogfelagnum, har tey eisini høvdu gjørt nógv burtur úr at vísa á, hvat felagið og limir tess standa fyri og arbeiða við.

Maud sigur, at limirnir í Pedagogfelagnum virka á so mongum og ymiskum pallum, sum mong fólk neyvan rættiliga geva sær far um, og tí heldur hon tað vera sera umráðandi, at fólk flest fáa kunnleika um hetta virksemið.

At hava ein bás í einum tílíkum tiltaki gevur felagnum møguleika at gera vart við seg og koma í samband við fólk, bæði aðrar luttakarar á fólkafundinum, lands- og kommunalpolitikarar og annars tey mongu vitjandi.

– Eitt tílíkt netverk hava bæði umsiting og nevndarlimir felagsins brúk fyri. At hittast og práta saman um ymiskar spurningar á ein tílíkan óformellan hátt við tey, sum vit annars hava at kalla dagligt samskifti við, hevur nógv at siga, sigur forkvinnan í Pedagogfelagnum, sum vónar, at tiltakið við einum tílíkum fólkafundi, verður afturvendandi. Nakrir av luttakarunum á fólkafundinum skipaðu eisini fyri øðrum tiltøkum enn at luttaka við einum bási, men tað vóru ikki stundir til hjá Pedagogfelagnum á hesum sinni. Maud heldur, at næstu ferð kundi verið eitt hugskot, at Pedagogfelagið saman við hinum feløgunum í fakfelagssamstarvinum skipaði fyri onkrum felags tiltaki.



*Pedagogfelagið hevði rættiliga gjørt seg út við at bjóða teimum vitjandi á básinum ymiskt upplýsandi tilfar um fjøltáttaða pedagogiska økið, og tað hevði sera stóran áhuga millum fólk.*



# Dagstovnaleiðarar í Havn gjørt uppskot um fyrireikingartíð

Orð: Tórfinn Smith



*Maika L. Samuelsen sigur seg vóna, at uppleggið fær góða móttøku frá býráðnum*

Eftir at hava verið í verkfalli í 22 dagar eydnaðist tað Pedagogfelagnum at fáa ein sáttmála í lag við arbeiðsgevararnar. Eitt av stóru málunum hjá felagnum at fáa bøtt um, var kravið um fyrireikingartíð. Í undanfarna sáttmála stóð, at pedagogar og hjálparfólk kundu fáa ein tíma um vikuna í fyrireikingartíð, og í nýggja sáttmálanum kom afturat at standa: „Hjá pedagogum og hjálparfólki á dagstovnum skal tíð setast av til at fyrireika og eftirmeta pedagogiska arbeiðið“. Tað góðtók nevndin í felagnum, men tað vísti seg seinri, at millum dagstovnaleiðarar og starvsfólk annars var ivi um, hvussu nýggja orðingin í sáttmálanum skuldi skiljast í praksis.

Maika L. Samuelsen, leiðari á Býlingshúsinum í Maritugøtu, sigur, at á fundi millum allar dagstovnaleiðararnar í Tórshavnar kommunu, borgarstjóran og umsitingina, fingu tey at vita, at nýggi sáttmálin gav ikki meira av fyrireikingartíð enn undanfarni sáttmálin, men Heðin Mortensen gloppaði kortini dyrnar so mikið, at hetta var eitt mál, sum tey kundu tosa um. Dagstovnaleiðararnir tóku borgarstjóran upp á orðið, og avtalað varð at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot um hvussu fyrireikingartíð kundi skipast. Í arbeiðsbólkin kom ein leiðari fyri frítíðarskúla, ein fyri barnagarð, ein fyri vøggustovu og ein fyri ungdómshús. Harafturat luttóku leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og leiðarin á fíggjardeildini á fundunum í arbeiðsbólkinum.

## Fyrireikingartíð og kostnaður

Maika Samuelsen, sum er ein av limunum í arbeiðsbólkinum, sigur, at borgarstjórin var við á teirra fyrsta fundi. Hann ynskti at fáa greiðu á, hvat økta fyrireikingartíðin skuldi brúkast til, og hvat tað fór at kosta kommununi, og m.a. við tí arbeiðssetningi fór arbeiðsbólkurin til verka.

– Sum er hava vit stovufundir, starvsfólkafundir umframt at pedagogar hava ein tíma um vikuna til fyrireiking, og er hetta vanliga lagt inn í arbeiðsætlanina. Harafturat hava vit tveir ráðleggingardagar um árið. Síðani koma foreldrafundir, viðtalur, eygleiðingar, skriv o.a., sum ofta kemur afturat tí dagliga arbeiðinum. Í arbeiðsbólkinum hava vit nú nágreinað, júst hvat hesir fundir, ráðleggingardagar og fyrireikingin sum heild verður nýtt til og gjørt okkara tankar, um hvussu nógva tíð vit kundu hugsað okkum afturat, og hvat hendan skal brúkast til. Harafturat hava vit kannað hvat hendan eyka fyrireikingartíðin fer at kosta kommununi, sigur Maika.

Tað er rættiliga ymiskt, hvussu nógv børn og í hvørjum aldri eru á teimum ymisku stovnunum. Harafturat er eitt sindur ymiskt við tímatalinum hjá hvørjum einstøkum starvsfólki. Tí mæla tey í arbeiðsbólkinum til, at fyrireikingartíðin verður býtt út á stovnar í mun til barnatal.

## Markaðir pengar

Uppleggið hjá arbeiðsbólkinum er 10 minuttir fyri hvørt barnið um vikuna, sum verða vektaðir í mun til vøggustovubørn, barnagarðsbørn ella børn í frítíðarskúla ella ungdómshúsi. Stovnsleiðarin ger av, nær og hvussu tímarnir verða nýttir, alt eftir hvussu arbeiðsgongdirnar eru á stovninum. Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at hesir pengar verða markaðir júst til ætlaða endamálið.

Maika sigur, at nú er arbeiðsbólkurin liðugur við sítt arbeiði. Umsitingin hjá býráðnum hevur fingið teirra upplegg og fer at viðgera tað, áðrenn tað verður lagt fyri politikararnar at taka støðu til. Hon sigur, at tey eru væl vitandi um, at fíggjarorkan hjá býráðnum er avmarkað, og tí er teirra upplegg ógvuliga realistiskt, sum hon tekur til.

Í arbeiðsbólkinum vóna tey, sum vera man, at uppleggið fær góða móttøku, sum tey eisini rokna við, tí tílík fyrireikingartíð kemur fyrst og fremst barninum til góða. Maika sigur, at nú er spónurin settur í greytin at økja um og ítøkiligera fyrireikingartíðina, og tað heldur hon vera stórt framstig, tí nú eru orð og krónutøl sett á. Tað er eisini at frøðast um, at Tórshavnar kommuna hevur viðgjørt hetta við einum sera jaligum anda við vón um at skapa enn betri karmar fyri børn, foreldur og starvsfólk á dagstovnunum í kommununi. Tekur Tórshavnar kommuna væl undir við hesum, heldur Maika tað ikki vera óhugsandi, at aðrar kommunur eisini meira ella minni fara at nýta hetta sum sín leist.

# Góð fyrireiking gagnar øllum



*Marius Joensen er leiðari á dagstovinum í Fuglafirði*

Eitt av avgjørdu krøvunum hjá Pedagogfelagnum í sambandi við seinastu sáttmálasamráðingar var, at limir felagsins fingu nøktandi tíð at fyrireika og eftirmeta pedagogiska arbeiðið. Hetta hevur verið ein tungur burður í fleiri ár, men seinast eydnaðist tað so at fáa við í sáttmalan, at hjá pedagogum og hjálparfólkum á dagstovnum skal tíð setast av til at fyrireika og eftirmeta pedagogiska arbeiðið. Tað eru tó tey, leiðslur og starvsfólk, sum hava ivast í, hvussu hendan orðing skuldi setast í verk, men í dagstovninum í Fuglafirði eru tey farin undir at gera eina skipan, sum bæði tey á dagstovninum og í kommununi kunnu góðtaka.

Marius Joensen, leiðari á dagstovninum í Fuglafirði, greiðir frá, at tey nú eru um at fara frá gomlu skipanini við so og so mongum fyrireikingartímum um vikuna, og fara í staðin at halda seg til ársverk. Tey hava roknað seg til, hvussu nógvar fyrireikingartímar tey hava tilsamans í eitt ár, og kunnu síðani nýta hesar eftir tørvi gjøgnum alt árið. Tað ger, at tey kunnu brúka fleiri tímar ávísar tíðir og færri aðrar tíðir, sum leiðsla og starvsfólk annars leggja til rættis, alt eftir nær og hvussu tørvurin er. Samanlagt verða nú eitt sindur fleiri tímar til fyrireiking enn áður, sum aftur vil siga, at færri tímar verða saman við børnunum, tí tey hava ikki fingið fleiri tímar at arbeiða við, men tað heldur leiðarin, at tey møguliga kunnu liva við, tí við betri fyrireiking, fæst vónandi meira burtur úr dagliga arbeiðinum saman við børnunum. Fyri starvsfólkini merkir tað eisini, at tey fáa eina greiða fatan av, hvussu nógvar tímar tey skulu brúka saman við børnunum, og nú er eingin í iva um, at tey fáa løn fyri fyrireiking, sigur Marius Joensen. Enn eru tey tó ikki reiðiliga byrjað eftir hesi nýggju skipanini, men Marius roknar við, at tað verður einaferð í heyst.





Blika

TELEFON 606 666



Durita Toftegaard
**Søluráðgevi**
Norðuroyggjar,
Eysturoy,
Norðurstreymoy

Fartelefon 233 661
durita@blika.fo



Jónfinn Petursson
**Søluráðgevi**
Suðurstreym,
Vágar, Sandoy

Fartelefon 233 665
jonfinn@blika.fo






# Burðardygg leiðsla

## – leiðsla við hjartanum

*Steen Hildebrandt hevði fyrilestur á landsleiðaradegnum á Hotel Hafnia 12. oktober*



*Annika Wenningsted Jacobsen, leiðari á Dagstovninum á Hamrinum, skrivar*

Ein sera áhugaverdur dagur, ið byrjaði við, at forkvinnan í leiðararáðnum bjóðaði vælkomin. Síðani setti forkvinnan í Føroya Pedagogfelagað, Maud Wang Hansen, dagin við eini vælorðaði innleiðing. Síðani kom høvuðsnavnið, Steen Hildebrandt og hevði ein framúr góðan fyrilestur um at leiða við hjartanum.

### Blá bók:

Steen Hildebrandt, Ph.D., er professari í organisatións- og leiðsluteori á Institut fyri Marketing og Organisatión, Aarhus Universitet.

Stovnari av, nevndarformaður og partnari í ráðgevingarfyritøkuni Hildebrandt & Brandi A/S. Fyrilestrarhaldari, rithøvundur o.a. Útbúgvin cand. merc. (1968) í „erhvervsøkonomi, operationsanalyse og organisation“. Ph.D. (1976) um „implementering af styringsmodeller“. Hevur granskað í leiðslu- og organisatiónsteori, stýringsmodellum og implementering av teimum, broytingarleiðslu o.a Steen Hildebrandt hevur móttikið fleiri virðislønir fyri sína gransking, millum annað NOAK-prísin, Hede Nielsen-prísin og Passiónsprísin. Í 2010 varð Hildebrandt kosin besti fyrilestrarhaldari í Danmark innan leiðslu. Í 10 ár á rað er hann valdur til besta MBA undirvísara í Danmark. Hildebrandt hevur verið við til at skriva meir enn 400 bøkur um organisatión og leiðslu.

### Burðardygg leiðsla – leiðsla við hjartanum

Steen Hildebrandt tosaði um burðardygga leiðslu – at leiða við hjartanum. Burðardygg leiðsla merkir: „at kunna leiða yvir til næsta stig“, at vit kunnu rætta kós í teimum leiðum, vit virka í. Hildebrandt segði beinleiðis, at um vit ikki eru før fyri at arbeiða burðardygt, „så dør vi“. Hetta gevur eina beinleiðis fatan av, at tað er sera týdningarmikið.

Hildebrandt tosaði um hugsanarhátt ella lyndi (en.: *mindset*). At tað hevur stóran týdning fyri okkara leiðslutilgongd, hvussu vit hugsa, virka og samskifta. Hugsanarháttur og hugburður er okkara tankar og okkara „innara-landslag/model av verðini“. Hildebrandt sigur, at alt verður stýrt av okkara hugsanarhátti og lyndi. Alt, ið vit hava lært sum børn – virði, normar, moralur o.a. skapar okkara hugburð og hugsanarhátt. Tað er ikki lætt at sleppa av við aftur, tað er grundarlagið í okkum sum menniskju. Sum leiðari er umráðandi, at vit eru varug við júst okkara egna hugsanarhátt, at vit sum leiðarar eru før fyri at koyra okkurt burtur, soleiðis at nýhugsan sleppur framat.

Út frá „U-ástøðinum“ snýr tað seg um at kunna seta okkara vanliga hugsanarhátt til viks, soleiðis at vit verða før fyri at hyggja eftir, hvat vit hava. Síðani at broyta kós fyri at merkja eftir. Harnæst at kunna sleppa, soleiðis at vit koma heilt niður í botnin á U-inum – skapandi nærvera (*presensic*), og verða før fyri at taka ímóti.

Síðan skulu vit upp aftur hinumegin í U-inum, har visiónirnar og intentiónir-





Myndir: Tórfinn Smith




nar koma til sjóndar og búnast. Vit koma longur upp, har frum- og fyrimyndir fáa skap (*prototypetænkning*) og gerast grundarlag undir ætlanum um mannagongdir og framferðarhættir – fyri síðani at fara til verka (sí mynd: ***Teori-U***)

At møta nútíðini og framtíðini á ein nýggjan hátt. Nýhugsan í sambandi við at leiða og at taka avgerðir. Tað kann ikki annað enn vera spennandi og avbjóðandi fyri okkum menniskju. Vit vita jú, at okkara heili er gjørdur til at verða ímóti broytingum, so tað sigur seg sjálvt, at tað er ein stór avbjóðing at arbeiða við nýhugsan og eini kollveltandi tilgongd til leiðslu.

Hildebrandt sigur, at U-ástøðið er slóðbroytandi innan leiðslu, tí hendan hugsanin vendir øllum siðbundnum hugsanum um leiðslu á høvdið. U-ástøðið leggur upp til at arbeiða við mediatión, at sleppa fortíðini og í staðin lata hjartað upp – fara við «opnum sinni, opnum hjarta og opnum vilja». Tíðin, lokalsamfelagið og globalsamfelagið hava tørv á nýhugsan og at rætta kós. At vit hava tørv á einum paradigmuskifti. Endamálið við U-ástøðinum er: *„..at skildre en social teknologi vedrørende transformationelle forandringer, som vil hjælpe ledere med at møde de udfordringer, som de står over for“* (citat Hildebrandt).

Steen Hildebrandt tosaði nógv um meiningina ella týdningin av tí, vit gera. Hann tosaði um, at tað hevur sera stóran týdning, at vit leiðarar altíð eru vitandi um endamálið/meiningina við tí, vit gera.  Hann nevndi, at vit menniskju hava lyndi til at festa eyguni á tilgongdina fyri at røkka málinum og gloyma ofta,  hvat málið  í veruleikanum er! «Tað eru nógv svar, men hvør er spurningurin?», «Heimurin er fullur av svarum, men hvør er spurningurin?» (citat Hildebrandt).

Hildebrandt segði, at tað hevur stóran týdning, at vit leiðarar endurskoða endamálið av og á, soleiðis at vit alla tíðina vita, hvat meiningin er! At reflektera, *„at lade hvilen falde på sig“*, sum Hildebrandt orðaði seg, er alfa og omega fyri at kunna verða ein góður leiðari. At vit eru tilvitað um og kenna okkara „blinda blett“. Hildebrandt tosaði eisini um „pro-flektere“, ið merkir at læra av tí komandi framtíðini. Ein góð venjing í at proflektera er at hyggja granskandi at støðuni/skipanini og síðan spyrja:

1. hvat í støðuni/skipanini er um at doyggja burtur?
2. hvat í støðuni/skipanini er um at vaksa fram?

Hetta ljóðar kanska banalt, men sambært Hildebrandt er tað ein góð venjing við tað at vit noyðast at refektera um málið; aftur: «hvat er meiningin?», og har við læra av framtíðini, altso proflektera. Hildebrandt kom eisini inn á leiðslufyribrigdið afturvirkni (*feedback*). At vit sum leiðarar skulu lurta, síggja og skilja fyri síðani at handla og virka. Natúrligar skipanir virka gjøgnum afturvirkni, sigur Hildebrandt.

At leiða við hjartanum snýr seg sambært Hildebrandt um **meining**. Meining við lívinum og meiningin við organisatiónini.

Í sambandi við *integritet* er tað eg og mín samleiki, sum er í miðdeplinum. *Resonans*, tá er tað í mun til mín sosiala førleika, hvussu eg eri í relatiónum við onnur. Empati, og tað at verða førur fyri at lurta og síðani at handla og virka frá røttum stað. *Med*ábyrgd,




Figur 1. Ledelse med hjertet – trekanten

tað er har, ið eg taki ábyrgd av øllum. Og so er tað, at Hildebrandt sigur, at tann góði leiðarin hevur stýr á sínum kenslum. Tann góði leiðarin er eisini førur fyri at standa við seg sjálvan og síni sjónarmið og at stíga fram. Og sjálvandi er tann góði leiðarin *motiveraður* og hevur visjónir fyri stovnin. „Missión, visión og strategi" er alfa og omega í sambandi við leiðslu, sigur Hildebrandt. *„Kan det måles, kan det ledes"* (citat Hildebrandt). Leiði eg tann rætta vegin í mun til visiónina? Hvat er meiningin við tí, eg geri?

At enda er at minnast til, at tú sum leiðari hevur ábyrgd av, at alt gevur meining … *„seek to understand, before you seek to be understood"*.

Heilt avgjørt ein sera áhugaverdur dagur við nógvum íblástri til at blíva ein betri leiðari og eitt betri menniskju.

Ein vælfyriskipaður dagur av leiðararáðnum. Góðar umstøður at vera í, og eitt gott forum at hittast í. Eg haldi, at tað var eitt sera gott evni, ið valt varð til dagin. Tað er eingin ivi um, at hetta er eitt evni, ið er nógv frammi í tíðini. Rákið í tíðini, ið eisini varð umrøtt á degnum, leggur uttan iva upp til, at vit endurskoða *meiningina* við okkum sum menniskja, sum stovnur og sum samfelag. At vit gerast betur før fyri at leiða (liva) við hjartanum, innifrá og út, sum onkur sigur. Takk fyri ein sera væleydnaðan dag við nógvum góðum vísdómsorðum frá Steen Hildebrandt, og takk til leiðararáðið í Føroya Pedagogfelag fyri ein vælfyriskipaðan Landsleiðaradag 2012.

## „Mind-set"/„Innara landslag"/„Model av verðini" (hugsanarháttur/hugburður/lyndi)

Tað er ein grundleggjandi lívshugburður, ein hevur um seg sjálvan, onnur og verðina. Hendan áskoðanin er avgerandi fyri, hvussu vit hugsa, kenna og bera okkum at. Okkara „innara landslag/model av verðini" er úrslit av royndum og upplivingum í barndóminum.

### Teori-U / U-ástøðið

Maðurin aftan fyri U-ástøðið er C. Otto Scharmer, seniorlektor við Massachusetts Institute af Technology. Hann hevur skrivað bókina „Teori-U, lederskab, der åbner fremtiden mod en ny social teknologi – presencing." Forlagið Ankerhus.

### Paradigmuskifti

Stórar broytingar í hugsanum um samfelagið og okkum sjálvi. Stórar broytingar í okkara hugsanarhátti/hugburði/innara landslag.

### Visión

Ein mynd av einum ynski um framtíðina. Hendan myndin er ávirkað av nú-inum.

### Opin vilji – opið hjarta – opið sinni [1]

**Opin vilji: Evnini at sleppa sínum gamla samleika og intentiónum og venda medvitinum** móti tí framtíð, sum er í ferð við at gerast veruleiki gjøgnum meg ella okkum. At sleppa sínum gamla **Eg'i og vera opin fyri tí autentiska Eg'num, sum er í umbúna. At lata upp fyri okkara SQ (spirituella intelligensi).**

**Opið hjarta:** Evnini at fáa medvitið at skifta kós og at síggja og fata við hjartanum. At flyta haðani, sum eins egna fatan stavar, til tað, sum er uttanum, til heildina. At lata upp fyri okkara EQ (emotionella intelligensi).

**Opið sinni:** Evnini at lata vera við at meta og døma og í staðin spyrja. At síggja eina og hvørja støðu við nýggjum eygum. At lata upp fyri okkara IQ (intellektuella intelligensi).

*[1] Teori – U lederskab, der åbner fremtiden. Claus Otto Scharmer, Ankerhus forlag*

# Pedagogfelagið fyrireikar sín egna FØROYSKA sosialpedagogiska profil

*– Tað er einki galið við tí danska, sum vit hava verið von við at hella okkum til, men tað er ikki alt, sum kann kopierast frá einum landi til annað, sigur Rógvi Thomsen, cand.ped., sum ráðgevur Føroya Pedagogfelag at orða sín egna sosialpedagogiska profil*

Orð og myndir: Tórfinn Smith

Skipað pedagogiskt arbeiði er rættiliga nýtt í Føroyum, og er talan um sergreinina sosialpedagogikkur, er tað eitt uppaftur nýggjari fyribrigdi. Tað kann Rógvi Thomsen, cand.ped., sum í mong ár hevur undirvíst í pedagogikki á pedagog- og lærara-útbúgvingini, tala um.

Rógvi greiðir frá, at tá hann kom at undirvísa teimum pedagoglesandi, høvdu tey bert pedagogik í sambandi við dagstovna-arbeiði, og eitt sindur um arbeiðið við menningartarnaðum. Tað helt hann ikki vera nóg mikið.

– Pedagogar arbeiða ikki bert á vanligum dagstovnum, men eisini á so mongum øðrum og ymiskum pallum og koma tí í samband við børn og ung, sum á ein ella annan hátt víkja frá øðrum, og tá ræður um at duga at eygleiða og vita, hvat best er at gera. Vístu børn og ung størri frávik, var ikki óvanligt at senda hesi av landinum, uttan at vit sjálvi høvdu gjørt okkum nakrar tankar, um hvat vit sjálvi kundu gera her í Føroyum, sigur Rógvi, sum helt, at tað fór ikki at bera til í longdini at eksportera fólk av landinum, í teimum førum, har vit ikki hildu okkum kunna gera eitt kvalifiserað pedagogiskt arbeiði.

– Eitt øki, ið nógvir pedagogar arbeiða á, er við menningartarnaðum, bæði á bústovni og verkstøðum. Hetta er eitt arbeiði, ið krevur servitan, men er eisini ein partur av sosialpedagogiska økinum. Undirvísingin í tí var á mangan hátt ikki samanhangandi við tað stóra sosialpedagogiska økið, men gjørdist ein sjálvstøðug disiplin – hetta avmarkaði fatanina og royndirnar, at seta pedagogikkin fyri menningartarnaði inn í eina sosialpedagogiska heild. Skuldi útbúgvingin á fullgóðan hátt fevna um sosialpedagogikkin, bæði í breiddini og kvalitativt, so var neyðugt, at ein sosialpedagogiskur partur var í útbúgvingini.

Í álitinum til eina nýggja pedagogútbúgving – PLÚ-álitið, sum Rógvi hevur verið við til at gjørt, verður eisini mælt til at styrkja um sosialpedagogiska partin av pedagogútbúgvingini.



*Rógvi Thomsen hevur eisini gjørt ein alment pedagogiskan profil til Pedagogfelagið, sum er væl drúgvari enn tann sosialpedagogiski, og líka so slóðbrótandi, tí tað er fyrstu ferð, tað er gjørt. Saman við Pedagogfelagnum valdi Rógvi at gera tveir profilar, tí at sosialpedagogiska økið er nýggjari og meira forsømt. Báðir profilarnir supplera hvønn annan.*

Seinnu árini eru nøkur átøk gjørd, uttan at vit hava gjørt okkum nakra veruliga og gjøgnumhugsaða ætlan um, hvat vit vilja við sosialpedagogiska økinum. Rógvi vísir á, at eingin hevur hugsað um ein møguligan trupulleika, fyrr enn vit hava havt hann, og í meira ella minni ráðaloysi hava vit ofta kopierað onkrar danskar arbeiðshættir og onkra danska loysn, serstakliga innan barna og ungdómsøkið.

– Danir hava ymiskar serstovnar við serútbúnum starvsfólki, men tílíkar skipanir kunnu vit ikki ókritiskt flyta yvir til okkara.

Vit hava rætt og slætt ikki ráð til at gera stovnar til øll møgulig sløg av trupulleikum. Tá kunnu vit lættliga koma út fyri at hava onkran stovn til eittans fólk, og tað ber ikki til. Hava vit hildið trupulleikan vera ov stóran til okkara, senda vit framvegis fólk av landinum, men við tí loysa vit als ongan trupulleika. Tá koma hesi fólk í heilt annað umhvørvi, enn tey eru uppvaksin í, og eru saman við starvsfólki, sum als ongan møguleika hava til at kenna til okkara viðurskifti og tí líka lítið skilja bakgrundina hjá teimum fólkum, tey tá skulu vera um. Harafturat er hetta dýrast hugsandi loysnin, sigur Rógvi, sum eisini saknar sakligt og fakligt orðaskifti um tílík mál. Hann heldur tað eisini vera neyðugt fyri at menna eina serstaka sosialpedagogiska fatan í mun til føroysk viðurskifti við støði í tí veruleika, vit liva í – og ikki tí danska veruleikanum.

Tað, sum okkum tørvar, eru stovnar og sosialpedagogiskt arbeiði, hugsað í mun til okkara tørv og umstøður, sigur Rógvi. Hetta ger seg galdandi á flest øllum økjum t.d.: børn og ung, menningartarnaði, fólki við sálarligum og fysiskum meini, viðgerðarstovnar fyri misbrúk, stuðlar, sernám, stuðlar í heiminum, familjudeplar, kvinnuheim og eldraøkið.

Alt sernámsfrøðiliga økið er eisini eitt sosialpedagogiskt øki, har sosialpedagogikkurin er yvirskipaða hugsunargrundarlagið undir sernámsfrøðini t.d.: menniskju, ið bera brek, menniskju við autismu og menniskju við ADHD.

Hetta er ein av høvuðsorsøkunum, til at Pedagogfelagið hevur ynskt at gera sín egna sosialpedagogiska profil, ein profil við støði í føroyska veruleikanum og tørvi.

## Onnur uppfatan av tí normala

Skal sosialpedadogikkur lýsast í stuttum, snýr hann seg í høvuðsheitum um pedagogisk átøk, sum eru rættað móti fólki, sum á onkran hátt ikki fella innan fyri tað, sum vit rokna fyri normalt. Fólk, sum hava ella fáa trupulleikar í lívinum og ikki rættiliga duga at liva tað lívið, sum vanliga verður kravt av fólki. Orsøkirnar kunnu verða mangar, t.d. uppvøkstur ella okkurt, sum er komið fyri seinni í lívinum. Men kann eisini vera menningartarn, sálarligir trupulleikar o.s.fr. Sosialpedagogikkur fevnir um fólk í øllum aldri og við nógvum ymiskum trupulleikum og breki. Grundarlagið er, at tann einstaki veit sjálvur, hvat er gott, hvat er til nyttu og hvat hevur týdning. Sagt øðrvísi: tann einstaki er fremsti serfrøðingur í egnum lívi. Tá ið tað kemur til fólk við menningartarni, er tað ofta, at vit lata tarnið koma fram um hesa hugsan.

Skal sosialpedagogiska arbeiðið lýsast við bert einum øki, ber til at nema við arbeiðið við børnum og ungum. Her er ein uppgáva at lofta teimum, soleiðis at tey fáa eitt betri lív, trivnað og lívsdygd.

Rógvi Thomsen greiðir frá, at mangan er talan um børn, sum hava fingið ein uppvøkstur, eyðkendur av, at tey ikki hava fingið avbjóðingar, intellektuelt og sálarliga, á sama hátt sum onnur børn. Onnur eru úr heimum, har børn hava verið fyri vansorgan. Aðrastaðni er misbrúk uppií, ella foreldraførleikin er vánaligur. Men felags er, at børnini fáa ein uppvøkstur, ið oftani gera tað trupult hjá teimum at fóta sær í lívinum. Vanliga eru hesi børn hvørki minni vitandi ella „órein“, men hava ein øðrvísi atburð enn børn og ung flest; og tey fáa tí ofta trupulleikar, tá ið tey eru saman við øðrum, tí tey ikki kenna sosialu teknini og normarnar. Tey halda, at teirra uppfatan er normal, eru ikki von við annað, tí soleiðis eru tey uppvaksin. Í tílíkum førum er uppgávan hjá sosialpedagogum at fáa hesi børn og ungu at síggja og skilja, at um tey handla øðrvísi, so verða tey eisini møtt øðrvísi. Handla tey øðrvísi, fáa tey eisini øðrvísi afturspæl. Á henda hátt gerast tey eisini greið yvir, at tað eru fleiri mátar at liva uppá. Pedagogiska útgangsstøði er, at barnið og tann ungi ikki er eitt problem, men hevur eitt problem – tað er problemið, ið er problemið, sigur Rógvi.

– At hjálpa tílíkum børnum krevur nógv av teimum fakfólkum, sum eru um tey, sum fyrst og fremst skulu trúgva uppá, at tey kunnu hjálpa, og ikki rokna hesi børn og ungu sum sjúk. Tey skulu skilja, hví hesi ungu gera tað, tey gera, uttan tó altíð at góðtaka teirra gerðir, men kortini skulu tey rúma teimum, sum tey eru, sigur Rógvi og leggur dent á, at umráðandi er ikki at hava frammanundan gjørdar vanahugsanir, sum vit mangan hoyra í dagligum práti um ung, sum kanska eru heldur ólátin, – hvussu skal hann ella hon vera, er av tí slagnum … hvussu var pápin ikki … sjáldan kemur dúgvuungi úr ravnseggi … tað kann ikki vera øðrvísi, og tí er einki at gera. Rógvi sigur tað vera umráðandi fyri pedagogin at duga at fara í eina álitisvekjandi relatión við støði í barninum, men við broyting fyri eygað.

Tað er ikki pedagogurin, ið skal broyta, men barnið sjálvt og tann ungi sjálvur. Men, tað er pedagogurin, ið hevur ábyrgd av at menna karmarnar um samskiftið millum barnið, tann unga og pedagogin. Hesar relatiónir eru grundaðar í menniskjansligheit og fakligari fatan. Samstundis vísa tær á alternativar leiðir, ið stuðla barninum og tí unga í eini broytingargongd, ið er partur av einum støðugum relationellum samskifti við pedagogin.

Rógvi Thomsen sigur um sosialpedagogiska profilin, sum hann hevur ráðgivið Pedagogfelagnum at orða, at hesin skal vísa, hvat Pedagogfelagið stendur fyri. At orða og seta út í kortið eina sosialpedagogiska fatan, sum fer at síggjast aftur í pedagogiska arbeiðinum. Tað snýr seg um eitt menniskjasýni, sum sær tilfeingi í hvørjum menniskja, men sum ikki hevur havt møguleikar at menna hesi.

## Sosialpedagogikkur
# – Meining fyri øll

Øll menniskju eru virðismikil og skulu hava møguleika at virka eftir førimuni. Eisini tey, ið vegna serstakan tørv og atferð skulu hava hjálp og stuðul til at skipa ein virðiligan og meiningsfullan gerandisdag. Henda týðandi uppgávan krevur nógvar menniskjaligar og fakligar førleikar, og er sjálv kjarnan í sosialpedagogiska arbeiðnum.



# ØLL hava fráboðanarskyldu

## At boða frá er ikki at slatra!

Orð: Tórfinn Smith

Undir heitinum „Børn hava rætt til eitt gott lív“ er Barnaverndarstovan, saman við SSP-samstarvinum, farin undir eitt átak, sum m.a. skal varpa ljós á fráboðanarskylduna. Talan er um eina 3-ára verkætlan, sum byrjaði við einum almennum fundi í Norðurlandahúsinum 25. oktober við ymiskum spennandi tiltøkum á skránni. Oddbjørg Balle, leiðari á Barnaverndarstovuni, sigur, at endamálið við hesum fundinum og átakinum annars var at varpa ljós á fráboðanarskylduna, soleiðis at øll eru greið yvir, hvat fráboðanarskyldan ber í sær. Ikki minst fakfólk. Somuleiðis fara tey miðvíst at leggja seg eftir at kunna børn frá 4. skúlaflokki av og uppeftir um uppgávunar hjá barnaverndartænastuni eins og rættindi hjá børnum. Hetta, at øll børn hava rætt til eitt gott lív uttan ágang av nøkrum slag. Hetta leggur barnaverndartænastan eisini stóran dent á og ynskir tí at gerast enn meira sjónlig í sínum øki. Somuleiðis, at børn fáa alla neyðuga kunning, m.a. í skúlahøpi, um virksemið hjá barnaverndartænastuni.

Oddbjørg Balle leggur dent á, at tað eru ikki bert fakfólk, sum hava fráboðanarskyldu, verða tey varug við, at alt ikki ruggar rætt við einum barni. Øll hava fráboðanarskyldu. Munurin á fakfólkum og øðrum er bert tann, at fakfólk hava skerpaða fráboðanarskyldu og skulu navngeva seg, tá tey venda sær til barnaverndartænastuna við einum máli. Onnur nýtast ikki at navngeva seg.

Tað hevur verið frammi, at neyðugt er hjá fakfólki, eitt nú lærarum, at nema sær eyka útbúgving í sambandi við um nýggju ásetingarnar um fráboðanarskyldu. Nýggja ásetingin sigur, at tey starvsfólk, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, *ella hava orsøk til at halda at viðurskifti eru,* sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Oddbjørg Balle heldur, at tað er at gera ov nógv av tala um eyka útbúgving, tí fakfólk eiga at vera so mikið fakliga væl fyri, at tey eru væl før fyri at varnast um ikki alt ruggar rætt.

Leiðarin á Barnaverndarstovuni heldur, at hetta ískoyti í lógini er rættiliga týdningarmikið, tí frammanundan høvdu fakfólk ikki skyldu til at fráboða, fyrr enn tey høvdu eina ávísa vitan um viðurskiftini. Ein illgruni ella varhugi gjørdi ikki, at fakfólk høvdu fráboðanarskyldu. Mett verður, at kravið um kunnleika kundi hava við sær, at fakfólk, sum bert hava ein varhuga av, at viðurskifti eru, ið kunnu skaða heilsu og menning hjá einum barni, ikki fráboðað henda varhuga, hóast tey eru stúrin um barnið. Fyri at tryggja, at ein og hvør ivi kemur barninum til góðar, bleiv fráboðanarskyldan hjá fakfólki skerpað

soleiðis, at tey eisini skulu fráboða, um tey hava orsøk til at halda, at komið eigur at vera uppí eftir lógini, sigur Oddbjørg Balle.

## Biðja sjálv um hjálp

Sambært hagtølum hava vit fleiri barnaverndarmál í Føroyum, enn tey hava í Noregi, sum hevur eina barnaverndarlóggávu, átøka við okkara, og tí ber til at sammeta landanna millum, men tað heldur Oddbjørg Balle ikki siga tað sama sum, at vit hava fleiri sosialar trupulleikar enn onnur. Ein møgulig orsøk er, at aðrar sosialar skipanir ikki virka á nøktandi hátt. Onnur orsøk kann eisini vera, at helmingurin av áheitanunum til barnaverndartænastuna í Føroyum koma frá teimum, sum hava ábyrgdina av børnunum og sum sjálvi ásanna, at tey hava hjálp fyri neyðini. Soleiðis er myndin ikki í Íslandi, har meginparturin av áheitanunum koma frá øðrum enn teimum, sum varða av børnunum. At avvarðandi sjálvi venda sær til barnaverndartænastuna, hava tey hjálp fyri neyðini, heldur Oddbjørg Balle vera ógvuliga positivt, tí tað er júst tað, barnaverndartænastan er til.

### Um SSP:

SSP er tvørfaklig samstarvsskipan millum fakbólkar, ið arbeiða ella hava samband við børn og ung. Endamálið er at savna og samskipa tað fyribyrgjandi arbeiðið og fremja felags atgerðir. SSP skal arbeiða fyri at fyribyrgja kriminaliteti og skaðandi atburði millum børn og ung.

SSP er eitt formligt samstarv millum:
Mentamálaráðið
Almannamálaráðið
Heilsumálaráðið
Kommunusamskipan Føroya
Føroya Kommunufelag
Politiið í Føroyum
Óli Rubeksen er ráðgevi í SSP samstarvinum

### Lógin um barnavernd

§ 14. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum.

Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning, hevur skyldu til at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin. Fráboðast skal eisini um kvinnu, ið er við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli t.d. vegna rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum. Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk. Barnaverndartænastan skal boða fráboðara frá, hvørt um fráboðanin er móttikin.




Fá sms-boð tá lønin kemur inn

Eik Banki P/F
Tel. 348000
www.eik.fo

Við Boðtænastuni kanst tú halda eyga við, hvat fer fram á kontuni. T.d. ber til at fáa sms-boð og/ella t-post, tá lønin/studningurin kemur á kontu, ella tá saldan fer niður um eina ávísa upphædd.

Boðtænastan riggar á flest øllum fartelefonum og er ókeypis at stovna. Hvørt boð kostar 0,50 kr. Les meira um Boðtænastuna á heimasíðuni www.eik.fo

# Altjóða sosial-pedagogiskur dagur



*Maud Wang Hansen*

Í samband við at tað 2. oktober var altjóða sosialpedagog-dagur, bóru vit hesa heilsan!

Góðu politikarar og øll sum varða av stovnum fyri børn og ung.

Í 1989 lovaðu alheims stjórnir, at øll børn skulu hava somu rættindi, við at taka undir við ST-Barnarættindasáttmálanum. Hesi rættindi eru grundað á tørvin hjá barninum fyri at yvirliva, mennast, luttaka og fremja sínar førleikar. Rættindini eru galdandi fyri øll børn, uttan mun til hvørji tey eru og hvaðani tey eru.

Barnarættindasáttmálin er tann største staðfestingin av øllum ST- sáttmálum og gevur barninum fullan myndugleika – eisini til at tosa um síni egnu sjónarmið og meiningar og at vera við í øllum avgerðum, ið hava ávirkan á lívið hjá einstaka barninum. Tað eru nógv børn í heiminum, ið ikki fáa gleði av hesum rættindum. Tey liva í fátækradømi, ótryggum umstøðum ella uppliva ymisk sløg av harðskapi og misbrúki.

Pedagogar, sosialráðgevarar, lærarar og øll onnur, ið arbeiða við børnum, leggja stórt arbeiði í, at tryggja og verja hesi rættindi.

Í januar í 2012 gav NFFS (Norðurlenskur felagsskapur fyri sosialpedagogar) út FN´s Børnekonvention og sosialpædagogikken.

Í 2010 gav sami felagsskapur út eitt arbeiðsrit um ST-sáttmálan fyri fólk sum bera brek og arbeiðið hjá sosialpedagogum.

Vegna
Føroya Pedagogfelag
Maud Wang Hansen, forkvinna

## AIEJI World Congress 2013

Sera áhugaverd heimskongresss um sosialpedagogikk.
Her kanst tú melda teg til.


# Netbankin sum app

Avgreið tey flestu bankaviðurskiftini tá tað passar tær

Við Netbanka sum app kanst tú m.a.

- síggja salduyvirlit
- síggja IBAN nummar
- gera flytingar
- gjalda rokningar
- rokna gjaldoyra
- fáa samband við bankan



SUÐUROYAR SPARIKASSI


lív.fo
Fá eitt ríkt lív
Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu
Persónlig eftirløn
Lívið lagar seg ymiskt fyri okkum øll. Tí hava vit eisini tørv á ymiskum eftirlønum. Sum Føroya største og royndasta eftirlønarfelag, veitir Lív tær eina persónliga eftirløn. Vit hjálpa tær at laga tína eftirløn til tað lív, tú vilt liva og til ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á liv.fo og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.
Innlit í útlit